# Jól í Georgia og Rumenia



Í Georgia halda fólk jól tann 7. januar, eftir tí Julianska kalendaranum. Ein jólasiður í Georgia er at fara við í eina stóra skrúðgongu, har fólk eru ílætin serlig klæði, so tey kunnu hátíðarhalda dagin, og ynska hvørjum øðrum eini gleðilig jól. Skrúðgongan nevnist "Alilo". Tey sum ganga við í skrúðgonguni, eru ofta børn, og tey fáa ofta góðgæti frá eldri fólki, sum standa framvið skrúðgonguni. Ymiskt er hvussu nógv verður gjørt burtur sanginum til Alilo-skrúðgonguna. Í flestu songunum ganga hesi orðini aftur: "Otsdakhutsa dekembersa qriste ishva betlemsao" – 25 desember var Kristus føddur í Betlehem. Jólini í Rumenia fella á 25. desember. Og verður roknað at verða tann týdningarmesta átrúnaðarliga hátíðin aftaná Páskirnar. At syngja jólasálmar er ein týðandi partur av Jólunum í Rumenia. Á fyrsta Jóladegi fara fólk syngjandi um gøtur og stræti, og fremst í gongunum hava tey eina stjørnu, og myndir av ymiskum søgum úr Bíbliuni. Siður er eisini í Rumenia, at tey smæstu børnini ganga í húsini. Har syngja tey jólasálmar.




















